Ár 2015, tann 14. apríl, varð ársaðalfundur hildin í P/f Vágatunnilin. Fundurin varð hildin á Hotel Hafnia. Ætlanin var, at fundurin skuldi byrja kl. 11.00, men varð útsettur til kl. 13.00 eftir avtalu við partaeigaran.

Fundarluttakarar:

Partaeigarin var umboðaður av Jørgen Niclasen, landsstýrismanni, Bjarna Askham Bjarnason og Atla Eirikson frá Fíggjarmálaráðnum. Øll nevndin var á fundi umframt stjórin Uni Danielsen. Grannskoðararnir Jógvan Amonsson og Jan Arabo umframt Óla Jákup Kristoffersen, advokatur, vóru eisini á fundi.

1. Nevndarformaðurin Jens Kári Vilhelm ynskti vælkomin og skeyt upp at velja Óla Jákup Kristoffersen sum fundarstjóra. Hann varð valdur. Fundarstjórin staðfesti, at fundurin lógliga var innkallaður, og lýsti soleiðis fundin sum lógliga settan.

2. Stjórin Uni Danielsen greiddi vegna nevndina frá virki felagsins í farna ári, herundir eisini kunning sambært § 18. Frágreiðingin varð givin við støði í Power Point, eins og skrivligari ársfrágreiðing, sum varð býtt út á fundinum. Stjórin greiddi vegna nevndina m.a. frá fylgjandi:

   Høvuðstølini fyri rakstrinum 2014 vórðu gjøgnumgingin og samanborin við somu tøl fyri 2013. Greitt varð frá ymsum arbeiðum, sum vóru farin fram farna árið m.a. um tænastusáttmálar, arbeiðir uppá loft og veggir í tunlunum o.s.fr. Eisini varð greitt frá um fíggingina m.a., at lánsfíggingin partvíst var afturgoldin áðrenn tíð. Eisini varð komið inn á alment um ferðsluna í tunlum, herundir at tunlarnir báðir bundu saman landið, soleiðis at 87% av íbúgvunum vóru samanbundnir við vegasambandi. Eisini varð greitt frá miðalferðsluni pr. dag fyri árini 2012, 2013 og 2014. Greitt varð víðari frá prísgongdini fyri ferðsluna gjøgnum árini 2003-2014. Miðalprísurin fyri at koyra ígjøgnum tunnilin aftur og fram í 2014 var kr. 56,76 fyri alla koyring. Eisini varð greitt frá, hvaðani í Føroyum ferðslan stavaði. Rakstrarætlan fyri 2015 varð framløgd umframt fíggjarætlan fram til medio 2017, tá roknað er við, at tunnilin er avhendaður til tað almenna.

   Spurningar vórðu settir og viðmerkingar gjørdar so hvørt undir frágreiðingini.

   Síðani varð frágreiðingin frá nevndini tikin til eftirtektar.

3. Jógvan Amonsson gjøgnumgekk roknskapin.

   Jørgen Niclasen spurdi um útsettan skatt, og grannskoðarin svaraði.

   Roknskapurin varð góðkendur.

4. Ársavlopið varð flutt til næsta ár.

5. Nevndin varð afturvald.

6. Landsstýrismaðurin upplýsti, at tað almenna ynskti, at grannskoðarauppgávan varð boðin út, og spurdi nevndina, um nevndin hevði umhugsað hetta. Jens Kári Vilhelm, nevndarformaður,

svaraði, at tað hevði nevndin ikki. Landsstýrismaðurin segði síðani, at ein útbjóðing kanska ikki var so aktuell fyri hetta felagið, tí spurningurin var, hvussu leingi felagið fór at halda fram afturat. Verandi grannskoðari P/f JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki, varð afturvalt fyri komandi ár.

7. Innkomin uppskot og ymiskt.

Nevndarformaðurin Jens Kári Vilhelm gjøgnumgekk fíggjarætlan til ultimo 2016. Hann upplýsti vegna nevndina, at nevndin skeyt upp at avhenda tunnilin til tað almenna tann 10. desember 2016. Landsstýrismaðurin tók undir við tí.

Jógvan Amonsson upplýsti supplerandi, at tá tunnilin varð gjørdur, gjørdi nevndin av at avskriva tunnilin svarandi til lánstíðina.

Síðani var eitt ávíst orðaskifti um ta komandi avhendingina, fyrireikingar til eina avhendingartilgongd, sum skuldi fyrireikast í góðari tíð o.s.fr.

Síðani var fundur lokin.

Sum fundarstjóri:

______________________________
Óla Jákup Kristoffersen, adv.